# Nógvur roykur í tunnlinum

**Sløkkiliðið í Klaksvík varð boðsent til eldsbruna í tunnlinum til Hvannasunds, men talan var var um øðrvísi nýggjárshald**

ROYKUR
*Eyðun Klakstein*

Nýggjársdag um hálvgum fimm tíðina vóru boð eftir sløkkiliðnum í Klaksvík.

Orsøkin var, at nógvur roykur var í norðara enda á tunnlinum til Hvannasunds.

Líkindini at koyra mánadagin vóru út av lagi vánalig, tí nógvur krapi var á vegnum. Tveir bilar hjá sløkkiliðnum komu tó fram, men tá var roykurin burtur, og eingin eldur var nakrastaðni.

### Heksaýl

Orsøkin til nógva roykin var tó funnin, tí onkur hevði havt fragd av einum øðrvísi nýggjárshaldi í norðara borðoyartunnlinum.

Ein pakki av teimum larmandi heksaýlunum var brendur av í tunnlinum, og tað hevði nógva roykin við sær.

Fólk, sum komu í tunnilin stutt eftir hetta, vóru illa við av nógva roykinum í tunnlinum og boðsendu tí sløkkiliðnum.



# Norðmenn sleppa ikki at drepa grind

GRIND
*Jógvan H. Gardar, Oslo*

Norska fiskimálaráðið hevur sagt nei til at norskir hvalaveiðumenn skulu drepa grindahval. Norges Småkvalfangerlag hevur fleiri ferðir sent umsókn til myndugleikarnar, har biðið verður um loyvið at drepa grindahval sum eina royndarveiðu.

Sambært Havgranskingarstovninum í Bergen kann grindastovnurin tola eina veiðu uppá 15.000 hvalir. Men granskingarstovnurin meinar grindahvalurin er tann tannhvalurin í Norðuratlantshavinum sum vit vita mest um. Tískil er ikki neyðugt at kannað hann enn meir gjøgnum eina royndarveiðu.

Norðmenn drupu grindahval heilt fram til sjeytiárini.

# Tordur bygdarráðsformaður

**Tordur Niclasen verður bygdarráðsformaður á Eiði komandi valskeiðið**

KOMMUNUVAL
*Edvard Joensen*

Nýggi bygdarráðsformaðurin í Eiðis Kommunu eitur Tordur Niclasen. Tað varð greitt eftir bygdarráðsfundin fríggjakvøldið, har bygdarráðið valdi formann og næstformann. Til næstformann varð vald einasta kvinnan í bygdarráðnum, Anna Maria Poulsen.

Í Eiðis Kommunu eru tríggjar bygdir. Eiði, Ljósá og Svínáir. Anna Maria Poulsen býr við Ljósá, meðan hinir bygdarráðslimirnir allir búgva á Eiði.

Nýggi bygdarráðsformaðurin á Eiði sigur, at ætlan hansara verður at reka ein varnan fíggjarpolitikk komandi skeið. Konsolidering og raðfesting verða lyklaorðini, sigur nýggi bygdarráðsformaðurin.

Tordur Niclasen starvast dagliga sum fyristøðumaður á Eysturoyar Røktar- og Ellisheimi, haðani hann hevur leiðsluroyndir síðan 1984. Eisini hevur hann drúgvar royndir í politikki. Hann hevur verið tingmaður í 16 ár, umframt eisini at hava sitið eitt skeið í landsstýrinum.

Tordur Niclasen er annar av tveimum bygdarráðslimum á lista B við bygdarráðsvalið á Eiði. Hann fekk næstflestar persónligar atkvøður á valinum.



# JFK-skipini aftur til fiskiskap

**Nýggja rækjuskipið hjá JFK fer í vikunitil Eysturgrønlands. JFK skal hava nýggjan trolara fyri 135 milliónir krónur**

FISKIVINNA
*Eyðun Klakstein*

Tað var svart av skipum við bryggjurnar í Klaksvík á jólum og millum jóla og nýggjárs. Øll skipini hjá JFK-samtakinum vóru inni um jólini, og harafturat lógu eisini stóru nótaskipini, línubátar, útróðrarbátar og onnur før við bryggju.

Nógv av skipunum eru farin aftur til fiskiskap. Seint annað jólakvøld fóru Norðborg og Christian í Grótinum avstað, og leygardagin fór Næraberg útaftur.

Restin av flotanum hjá JFK fer aftur til fiskiskap hesa vikuna.

Nýggja rækjuskipið hjá JFK Prawns, Fuglberg, fer til Eysturgrønlands ein av fyrstu døgunum eftir nýggjárið. Fuglberg kom til Klaksvíkar beint fyri jól, og liggur í løtuni í Havn, har skipið verður gjørt klárt.

Sundaberg fer í Barentshavið, og Sjúrðaberg fer á Flemish Cap.

### Byggja nýggjan trolara

JFK Trol skal hava nýggjan Skálaberg fyrr tann, sum varð leigaður grønlendarum við forkeypsrætti.

Nýggi Skálaberg verður størri enn tann undanfarni. Hann verður næstan 75 metrar langur og 16 metrar breiður, og hann verður eisini nakað hægri enn gamli Skálaberg.

Nýggja skipið, sum fer at kosta 135 milliónir at byggja, verður bygt á norsku skipasmiðjuni Kimek, men skrokkurin skal gerast í Ukraine. Skipið skal eftir ætlan latast JFK Trol á heysti í 2002.

Nýggi Skálaberg fer at kunna trola við trimum trolum samstundis, og knapt 50 mans kunnu verða við trolaranum.

Umframt hetta skipið er hann eitt líknandi skip umfatað av nýggja sáttmálanum, men enn er endalig støða ikki til, um JFK fer at byggja tvey skip.



*Nýggja rækjuskipið hjá JFK fer til Eysturgrønlands í komandi viku.*

Mynd: Jan Muller



# Havnardrongur fyrstføddi í nýggju øldini



*Fyrsti føroyingurin í hesi øldini saman við systrini Ragnhild ið er 6 ár*

Mynd: Jens Kr. Vang

**Meðan fýrverk dundi yvir høvuðsstaðin, byrjaði fyrsti føroyingurin í nýggju øldini at gera vart við seg.**

FØÐINGAR
*Turið Kjølbro*

Tað er ósvitaligt nakað serligt at verða fyrsta barnið, sum er føtt í einum ári. Og ikki minni serligt at verða fyrsta barnið, ið er føtt í eini nýggjari øld. Nýggjársdag vóru tvey børn fødd á Landssjúkrahúsinum. Fyrra barnið, ein drongur, varð føtt beint fyri middag, kl. 11.19. og tað seinna, somuleiðis ein drongur, kom kl. 19.10. Báðir hava teir fingið serligu føðidagfestingina 01.01.01.

Tað var Sólvá Jacobsen í Havn, sum varð so heppin at eiga fyrsta føroyingin í hesi øldini. Hon var sett at eiga 29. des. So skuldi kortini ikki verða. Meðan rakettir og annað fýrverk myndaðu himmalin yvir høvuðsstaðin, byrjaði fyrsti føroyingurin í nýggju øldini at gera vart við seg.

– Um tað vóru rakettirnar ella okkurt annað, sum settu verkirnar í gongd, veit eg ikki. Vit fóru á sjúkrahúsið klokkan hálvgum fimm og beint fyri middag átti eg. Alt gekk væl og vit hava tað fínt, greiðir Sólvá frá.

Drongurin vigaði 3825 gramm og var 53 cm langur. Sólvá og maður hennara Jóannes eiga frammanundan dóttrina Ragnhild, sum er 6 ár. Hon er sum vera man ógvuliga errin av at hava fingið ein lítlabeiggja. Og ikki minni errin av, at lítlibeiggin líkist henni.

Í Klaksvík er einki barn komið í verðina í nýggja árinum. Tað seinasta, sum varð føtt á Klaksvíkar Sjúkrahúsi kom millum jólanna. Heldur ikki í Suðuroy er nakað nýggjársbarn. Tað síðsta barnið, ið varð føtt í oynni, kom væl fyri jól.

# Nótaskipini rimmar fiskiskap

**Føroysku nótabátarnir gjørdu rættiligt hál millum jóla og nýggjárs, og árið hevur eisini verið gott sum heild**

FISKIVINNA
*Eyðun Klakstein*

Nótaskipini Christian í Grótinum, Norðborg og Tróndur í Gøtu høvdu sera góðan fiskiskap millum jóla og nýggjárs.

Skipini hava roynt eftir makreli í ES-sjógvi, og gjáramorgunin landaðu tey í Noregi fyri aðru ferð, síðani tey fóru avstað annan jóladag.

Makrelkvotan í ES-sjógvi varð hækkað í november mánaði, og tí var nakað eftir at fiska nú við árslok. Prísurin er eisini vanliga góður við árslok, og tí hava túrarnir vestanfyri Hetland givið nógvar pengar.

### Besti túrurin

Christian í Grótinum gjørdi ársins besta túr og landaði í gjár 800 tons av makreli. Hósdagin millum jóla og nýggjárs landaði hann 200 tons.

Prísurin hevur verið góður – 4,70 krónur fyri kilo hósdagin og 5,03 krónur fyri kilo í gjár.

Norðborg hevur eisini landað tvær ferðir – samanlagt 1030 tons – men prísurin hjá honum var eitt sindur lægri enn hjá Christian í Grótinum, sum fekk besta prísin.

Tróndur í Gøtu landaði hósdagin 490 tons fyri 3,78 kilo, og í gjár landaði hann um 800 tons, og tá varð prísurin 4,30 krónur.

### Trivaligir manningapartar

Tey trý nótaskipini hava sostatt selt fyri umleið fimm milliónir krónur í part seinastu vikuna, og tað skuldi givið ein manningapart upp á einar 50.000 krónur fyri hesar dagarnar.

Christian í Grótinum kom við hesum seinastu túrunum upp á 63.000 tons fyri 2000, og í pengum hevur hetta verið veiða fyri 105 milliónir krónur.

Nótaskipini fara nú aftur til fiskiskap, men tá vit tosaðu við reiðaríini í gjár, var ikki greitt, hvaðar tey fara nú.



*Føroysku nótaskipini hava gjørt góðar túrar í ES-sjógvi seinastu dagarnar.*

Mynd: Jan Muller

# Trý innbrot í Havn

**Leygarnáttina vórðu trý innbrot fram í Havn. Gamli Bókhandil, Tórshøll og Sankta Josefs barnagarður stóðu fyri skotum, og í øllum trimum førum varð peningur tikin**

LØGREGLUTÍÐINDI
*Stefan í Skorini*

Kriminaldeildin á løgreglustøðini kann siga frá trimum innbrotum um høgtíðina. Tey vórðu øll framd fríggjanáttina og vórðu fráboðað leygarmorgun 30 januar.

Tórshøll hevði tann størsta peningaliga missin av hesum innbrotum. Har hevði onkur brotið inn og tikið eini 7000 krónur umframt nakrar sigarettir.

Í Gamla Bókhandli vantaðu 200 krónur og ein telefon, tá fólk varnaðust, at onkur óynsktur gestur hevði verið á vitjan.

Í barnagarðinum hjá nonnunum í Varðagøtu varð eisini eitt innbrot framt. Har vórðu nakrar hundrað krónur tiknar, men løgreglan veit ikki júst, hvussu nógv vantar í.

Felags fyri øll hesi innbrot er, at løgreglan ikki hevur handtikið nakran í hesum málum. Teir arbeiða við at finna fram til gerningsmenninar.

# Tikin við barrstóli

**Leygarnáttina sóu løgreglumenn eina heldur margháttliga sjón. Ein rúsaður maður var á veg til hús við einum barrstóli á rygginum. Hesin varð tó stolin í Marco Polo og er nú latin aftur. Umframt hetta skuldi løgreglan eisini taka sær av harðskapi í brúdleypi**

LØGREGLUTÍÐINDI
*Stefan í Skorini*

Tað er nógv, sum fólk kunnu finna uppá at taka við sær, eftir at tey hava verið á vertshúsi og fingið sær uppí nevið. Tað plagar at vera gløs og tílíkt, men leygarnáttin hevði ein maður funnið uppá ráð.

Hann hevði tikið ein barrstól uppá ryggin og hevði lagt leiðina heim. Tíverri fyri mannin rendi hann seg beint í løgregluna klokkan hálvgum fimm á morgni, tá løgreglubilurin koyrdi ígjøgnum býin.

Løgreglumenn fingu beinanvegin illgruna um, at stólurin varð stolin og steðgaðu tí manninum. Hann vildi einki siga og varð tí tikin inn á støðina, har hann svav rúsin av sær.

Stólurin stendur nú aftur á Marco Polo, og maðurin fær eina sak at dragast við.

### Harðligt brúdleyp

Í Havnar Klubba varð brúdleyp 29. januar. Tað endaði heldur harðliga, tí ein maður varð fluttur á sjúkrahúsið og ein annar á løgreglustøðina.

Ein ungur maður varð vorðin ómøguligur í fyllskapi. Hann hevði brotið okkurt og síðani sparkað ein annan mann, sum fekk snudd í høvdið. Neyðugt varð at seyma hann aftur.

Harðligi unglingin verður ákærdur fyri harðskap.

Annars verður sagt av løgreglustøðini, at ellivu hava verið á støðini og sovið rúsin av um høgtíðina, meðan tveir eru tiknir fyri at koyra við kenning.

Umframt hetta er ymiskt herverk framt ymsastaðni í býnum, sum vanligt er hvørt vikuskifti.

Á hvørjum ári kannar løgreglan fleiri av teimum handlum, sum selja fýrverkarí.

Hetta er fyri at tryggja, at einki ólógligt fer fram. Tað er ofta betri at gera fyribyrgjandi arbeiði.

Her verður kannað, um kundarnir eru nóg gamlir, um vøran verður goymd á rættan hátt, og um nakað ólógligt fýrverk verður selt.

Onkur handil fekk ávaring um at fáa ymisk viðurskifti í rættlag.